Grundgeving Ársins Átak

Er tað eitt, sum eyðkennir okkum í Føroyum, so er tað, at okkum dámar væl at vitja og at fáa vitjan. Vit vitja familju og kenningar, vit ganga í barnaføðingardagar hjá dóttir systkinabarn trímenningin, vit støkka inn á gólvið, vit heilsa uppá, og so framvegis. Og um tað onkuntíð ikki liggur fyri hjá okkum at koma, kunnu vit í øllum førum geva eitt like ella skriva okkurt á Facebook-vangan hjá teimum, sum eitt plástur upp á sárið.

Tá tað nú eru so nógv at vitja, at tað er torført hjá fólki at náa alt, má man royna at gera nakað serligt fyri at fáa fólk at vitja seg, so man ikki bara fær Facebook likes. Men tað er ikki altíð so lætt, tí onnur royna eisini at lokka tey at koma til sín at vitja. So tað er skilligt, at summi velja at leggja myndasøvn út á Facebook av sínum barnaføðingardegi, so vit øll kunnu minnast í felag, júst hvussu hugnaligt tað var. Og tað virkar, tí fólk eru sum seyðir: okkum dámar best at gera tað, sum øllum øðrum eisini dáma.

Tá tað snýr seg um at fáa sannført útlendsk ferðafólk um at koma til Føroyar at uppliva landið at halda feriu, er avbjóðingin uppaftur størri hjá føroysku ferðavinnuni. Tí øll onnur lond royna eisini at sannføra ferðafólkini um, at júst teirra land ella býur er tann besti fyri tey og teirra familju at vitja. Og hóast vit øll halda at Føroyar er tað vakrasta og mest sermerkta landið í heiminum, er tað ikki nóg mikið. Vit mugu eisini fáa onnur at trúgva upp á tað, ella í minsta lagi forvitnast so mikið nógv, at tey velja at keypa ein ferðaseðil henda vegin. Tað snýr seg um at skapa nakrar myndir inni í høvdinum á ferðafólkunum av, hvussu fantastiskt tað er í Føroyum. Og tá meina vit ikki við Facebookmyndir av hasum grønakakufótbóltsvøllinum frá 8 ára føðingardegnum hjá systirsoninum, tí slíkar myndir eru neyvan nóg lokkandi at fáa tey at keypa ein flogferðaseðil at koma henda vegin.

Nei, í nútíðar ferðavinnu vilja fólk vita, hvussu landið sær út, áðrenn tey koma. Og ikki bara tað - tey vilja hava møguleika at vita, hvussu tað sær út í gøtuni uttanfyri húsið, sum tey ætla sær at leiga, ella tey vilja kunna fara út á vegin frá hotellinum at ganga ein túr í grannalagnum. Tey vilja síggja út á Trøllkonufingur, og tey vilja kunna standa uppi á Slættaratindi og hyggja norðureftir. Og alt hetta skal vera gjørligt, áðrenn tey koma. Trupulleikin hevur verið, at tað hevur ikki verið møguligt í Føroyum. Fyrr enn nú.

Tí hvat er at gera, tá tað forritið, sum flestu ferðafólk brúka, ikki vil koma til Føroya at taka myndir av okkara praktfullu oyggjum? Tá man ikki hevur eina fíggjarætlan ella eina stødd, sum beinanvegin ger okkum áhugaverd fyri stórar fyritøkur? Jú, tá er neyðugt at hugsa eitt sindur út úr mjørkanum og brúka síni kreativu evni.

Tað verður sagt, at idioti er at gera tað sama umaftur og umaftur og vænta eitt øðrvísi úrslit. Tí er tað forfrískandi, tá onkur velur eina heilt aðra tilgongd til tann óloysta trupulleikan.

Ársins Átak er ein slík kreativ loysn uppá ein ítøkiligan trupulleika, og samstundis er tað genial marknaðarføring av Føroyum sum ferðamál. Tá man gjøgnumførir eitt hugskot við at seta myndatól á seyð, so hann tekur myndir av oyggjunum og støðunum, har hann gongur, tekur man ein kjans, tí man veit ikki, um ella hvussu umheimurin fer at taka ímóti hesum. Men átakið hevur tikið miðlar í øllum heiminum við storm við uml. 2 mia eksponeringum. Tá má sjálvt ein tann virðismiklasta fyritøkan í heiminum geva seg yvir, og Google valdi at senda starvsfólk og útgerð til Føroya at gera Google Street View.

Harafturat vildi Google eisini co-branda átakið og sær eitt virðið í at siga søguna á sínum egnu miðlum, og Google brúkar í dag átakið í síni marknaðarføring.

Ársins Átak 2016 er Sheep View átakið, sum Visit Faroe Islands hevur staðið fyri í samstarvi við Atlantic Airways, og sum hevur vakt ans um allan heim. Virðið á hesari umtaluni er torført at gera upp í pengum. Tó verður mett, at PR-virðið er omanfyri trý hundrað milliónir krónur, meðan kostnaðurin hevur verið ein brøkpartur av hesum. Hetta er eitt átak í orðsins sanna týdningi, og vit vilja við hesum bjóða Guðrið Højgaard, stjóra á Visit Faroe Islands niður her at taka ímóti heiðrinum fyri Ársíns Átak 2016.

,